**Føroya Handilsskúli søkir eftir**

# Lærarum

**til HH og FHS í Tórshavn og á Kambsdali frá 1. august 2005. Talan er um tíðaravmarkað størv skúlaárið 2005/2006. Hevur umsøkjari til deildina í Tórshavn útbúgving í lærugreinum, sum hóska til tørv skúlans, kann talan tó verða um fast starv.**

**Tímar eru leysir at søkja í lærugreinunum niðanfyri. Tímatølini í klombrum eru vegleiðandi og treytað av myndugleikanna góðkenning av undirvísingarvirksemi skúlaárið 2005/2006.**

**Tórshavn:**
Ársroknskapur A (5 t/v), Danskt A (6 t/v), Dekoratión (3 t/v), Enskt C (8 t/v), Fyriskipan A (4 t/v), Føroyskt C, A (8 t/v), Kunningartøkni C (4 t/v), Samfelagslæra/-Fiskivinna C (6 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Støddfrøði D, C (4-5 t/v), Sølubúskapur B, A (4-5 t/v), Vinnulívsrættur C (9 t/v), Virkisbúskapur C (12 t/v).

**Kambsdalur:**
Føroyskt C, A (24 t/v), Danskt A (12 t/v), Kunningartøkni C (12 t/v), Marknaðarførsla C/A (16 t/v), Mentanarfatan C (4 t/v), Miðlakunnleiki C (4 t/v), Samfelagslæra C (10 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Sølubúskapur B, A (13 t/v), Vinnulívsrættur C (6 t/v), Dekoratión (3 t/v).

**Arbeiðsuppgávur:**
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi.
- hevur viðkomandi útbúgving á bachelorstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi.
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
- eitt fakligt mennandi læringsumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

**Setanarkor til fast starv í Tórshavn:**
Fyrstu tvey árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu vera til reiðar at fara undir kravda námsfrøðiliga útbúgving skjótast gjørligt. Eisini hava teir skyldu at undirvísa í teimum lærugreinum, teir hava førleika til.

**Løn:**
Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og skal sendast hagar, sum umsøkjarin ætlar at starvast, t.v.s. antin Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn, ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali, 530 Fuglafirði. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi 27. mai 2005**. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo

Nærri upplýsingar um størvini í Tórshavn kunnu fáast við at venda sær til Olav Absalonsen, inspektør, á telefon 317177 ella oa@hsh.fo, og um størvini á Kambsdali við at venda sær til Páll Isholm, deildarstjóra, á telefon 444900/219930 ella palli@kambsdal.olivant.fo

*Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 á Fyrisiting, Handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 og á Kambsdali 20 lærarar. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum, HD og akademimerkonom.*

**Sjóbjargingarstøðin**
**MRCC-Tórshavn**
Tlf: +298 351300 • Fax: +298 351301
Telex: 81200 TLGR FA
Inmarsat C: 423 116210 • Inmarsat B: 323 116220 (voice)
323 116221 (Fax)

# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar innan fyri hesar knattstøður:

**Økið 1.**

| | |
|---|---|
| 61 15' N | 005 30' W |
| 61 00' N | 004 55' W |
| 60 43' N | 005 52' W |
| 61 00' N | 006 15' W |

**Økið 2.**

| | |
|---|---|
| 62 10' N | 003 15' W |
| 62 02' N | 003 00' W |
| 61 40' N | 003 55' W |
| 61 55' N | 004 08' W |

**Økið 3**

| | |
|---|---|
| 62 30' N | 004 30' W |
| 62 18' N | 003 57' W |
| 61 57' N | 004 50' W |
| 62 15' N | 005 20' W |

Felagið Fugro kannar økið.

| | |
|---|---|
| Byrja verður í øki 1 umleið | 16.05.2005 |
| Arbeiðið tekur væntandi | Umleið 6 vikur |
| Skipanavn | Polar Princess |
| Kallibókstavur | JXBV3 |
| Heimstaður | Bergen |
| Fiskiveiðiumboð | Magni Skaale |

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um arbeiði fáast frá Tórshavn Radio, á heimasíðuni hjá sjóbjargingarstøðini, www.mrcc.fo, ella á telefon 351300.

Internet Sosialur in
www.sosialurin.fo

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin